

*Børnini í Bólinum, sum stovan eitur, hava øll samskiftis og/ella kontakttrupulleikar. Tí hevur tað stóran týdning fyri familjurnar, at netið og nærumhvørvið skilja støðuna og kunnu stuðla og lætta um, tá ið á stendur. Mynd: Jens Kristian Vang*

# Einsamøll, men kortini saman

**Mitt í einum lítlum ljósum rúmi stendur eitt borð. Við borðið situr ein lítil drongur í einum serútgjørdum stóli og spælir. Stólurin heldur dronginum upp á pláss, tí hann hevur sovorðnan ófrið á sær. Hann sær nøgdur og upptikin út, í egnum heimi saman við tveimum smáum bilum. Og hann hyggur ikki upp, tá vit kaga inn til hansara.**

## Børn og ung



**Rigmor Dam**
blaðkvinna
rigmor@sosialurin.fo

Í hesum døgum lýsir Tórshavnar Kommuna eftir pedagogi til stovuna Bólið, sum er ein partur av dagstovninum í Øksnagerði.

Í starvslýsingini stendur, at starvið er á serstovuni, ið er ætlað børnum við samskiftis og/ella kontakttrupulleikum. Arbeitt verður miðvíst við at menna samskiftisførleikarnar hjá børnunum í einum skipaðum gerandisdegi, har stórur dentur verður lagdur á visualisering. Tað er tí ein fyrimunur at hava royndir/kunnleika til autistisk brek, og ynskiligt er, at umsøkjarin kann nýta teldu, tí hon er eitt týdningarmikið arbeiðsamboð í gerandisdegnum.

Hendan eitt sindur øðrvísi starvslýsingin sigur í sjálvum sær ikki so nógv um lítla varda umhvørvið, ið fjálgar um gerandisdagin hjá sjey havnarbørnum, sum ikki eru sum hini. Tí børnini í Bólinum, sum stovan eitur, hava øll samskiftis og/ella kontakttrupulleikar.

### Øll eru unik

Jóhanna Rubeksen, pedagogur, vísir okkum runt á stovuni. Eins og við børnunum, tykist alt í fyrstu atløgu at vera vanligt her. Men so við og við verður greitt, at alt kortini ikki er, sum vit eru von við.

- Umframt at børnini hava trupulleikar við at samskifta og at vera sosial, vanta teimum eisini evnini at ímynda sær. Men hóast tey hava nógv í felag, so eru tey øll unik og hava ymsan tørv. Bara við at kenna einstaka barnið, kunnu vit bjóða hóskandi karmar og avbjóðingar, sigur Jóhanna Rubeksen, pedagogur. Og hon vísir okkum stóra skápið við leikum í rúminum – alt leikur, sum hava eitt pedagogiskt endamál.

Stovan er býtt sundur í fleiri smá spæliøki við hálvveggjum, og allastaðni hanga smáir lepar úr plasti við tekningum og symbolum á. Hesir kunnu so flytast ymsar staðir, tí teir hava læraratyggigummi ella karalás á baksíðuni.

### Skipað kaos

Jóhanna Rubeksen greiðir frá, at av tí at alt er kaos inni í høvdunum hjá børnunum, hevur tað alstóran týdning at gerandisdagurin er væl skipaður – viðhvørt heilt niður í minstu smálutir. Tí hevur hvørt barnið eina nágreiniliga dagsskrá, og viðhvørt eisini eina hjálpiskrá.